## Friðarlig tjóðhátíð

Íslendingar hátíðarhildu í gjár, 17. juni, tann árliga tjóðardagin við einum hópi av tiltøkum kring landið. Tey størstu tiltøkini vóru sum vera man í Reykjavík, og sambært Morgunblaðnum vóru millum 20.000 og 30.000 fólk í miðbýnum har, tá tað almenna hátíðarhaldið endaði í gjárkvøldið. Kortini var hátíðarhaldið friðarligt. Løgreglumenn gingu millum fólkið alla tíðina, men sambært Morgunblaðnum høvdu teir lítið at takast við.



## Clinton vann 60 mió í fjør

Nýggj tøl vísa, at 2006 var eitt sera gott fíggjarár hjá fyrrverandi amerikanska forsetanum Bill Clinton. Síðani hann fór úr Hvítu Húsunum, hevur hann livað av at halda fyrilestrar. Og ikki kann sigast annað enn, at hetta er ein gevandi vinnuvegur hjá honum. Mett verður, at Clinton higartil hevur forvunnið umleið 230 milliónir fyri fyrilestravirksemið sítt. Tølini stava frá fíggjarligari uppgerð yvir privatu viðurskiftini hjá Hillary Clinton, og gevur hon eisini innlit í fíggjarviðurskiftini hjá manni hennara, sigur Wall Street Journal.

# Hovstunnil helst seinkaður

**Vandi er fyri, at Hovstunnilin verður nógv seinkaður, tí nú umhugsar Landsverk at broyta tunnilsmunnan**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta var sum at fáa nevan framman á.

Arbeiðsmenninir, sum í løtuni eru í ferð við at leggja síðstu hon á arbeiðið at gera Hovstunnilin lidnan, eru rættiliga ørkymlaðir.

Orsøkin er, at nú tunnilin er um at verða liðugur, hevur Landsverk boðað frá, at tað kanska verður neyðugt at stoypa upp í portalurin í tunnilismunnan norðarumegin, so at hann verður 10-20 metrar longri.

Stjórin hjá Ístaki í Føroyum, hevur ongar viðmerkingar til málið yvirhøvur, tí hann sigur, at tað er Landsverk, sum umsitur arbeiðið.

Men frá arbeiðsfólki í tunlinum vita vit, at friggjadagin á miðdegi kunnaði leiðslan í Ístaki arbeiðsfólkið um, at 10-20 metrar skulu stoypast upp í tann norðara portalin.

Mett verður at hetta fer at seinka tunlinum út ímóti trimum mánaðum.

- Hetta kemur sera dátt við hjá okkum, tí eftir innanhýsis arbeiðsætlanini hjá Ístaki, var ætlanin at tunnilin skuldi takast í nýtslu tann 15. juli.

- Tað er um ein knappan mánað.

Men skal portalurin stoypast longri, verður upplatingin seinkað einar tríggjar mánaðir.

Hjá Ístaki eru tey annars liðug í norðara enda á tunlinum. Men skal portalurin stoypast longri, skal hann hava eitt fundament at standa á og tí verður neyðugt at taka asfaltið og kaðalar upp aftur, fáa vit at vita frá fólki, sum hevur við tunnilin at gera.

Samstundis skal forskallingin setast upp av nýggjum og bara tað er ikki løtuverk, serliga tá ið hugsað verður um, at tey annars hildu seg vera liðug við forskallingina og at hon sostatt liggur niðurpakkað í Hovi.

Arbeiðsfólkið í tunlinum heldur tað verða ógvuliga løgið, at hetta skal stinga seg upp nú. Tí tað er langt síðani, at portalurin varð gjørdur.

Tá ið Portalurin varð gjørdur, skuldi hann verða eina ávísa longd. Men av tí, at tilfarið í fjallinum var so vánaligt, varð neyðugt at flyta hann longur inn í fjallið. Men av tí sama kemur hann ov stutt út úr tunnilsmunnanum og tí er nú upp á tal at stoypa hann longri.

Men tey halda, at hetta kundi langt síðani verið gjørt so at tað slapst undan, at tað seinkaði upplatingini.

- Hetta er eitt ógvuliga stórt bakkast fyri allar suðuroyingar, sum høvdu glett seg til at sleppa at koyra ígjøgnum tunnilin um ein mánað.

- Nú mugu teir brynja seg við toli í einar tríggjar mánaðir afturat, verður sagt inni úr fjallinum ímillum Øravík og Hov.



*Eftir arbeiðsætlanini hjá Ístaki, skuldi Hovastunnilin tast í brúk tann 15. juli. Men nú umhugsar Landaverk at longja portalin við norðara tunnilsmunnan skal longjast 10-20 metrar. Nógv halda, at tað er løgið, at Landsverk skal vera komin í tankar um tað nú, tí tað er langt síðani, at portalurin varð stoyptur*

# Landsverk: Slíkt hendir alla tíðina

**Stjórin í Landsverk sigur, at enn er ongin avgerð tikin um at longja portalin í Hovstunlinum, men verður tað gjørt, er onki løgið í tí**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Verða broytingar gjørdar í Hovstunlinum, er tað onki løgið í tí.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, heldur ikki, at nakað atfinningarsamt er í tí, at tað nú kemur upp á tal at longja portalin í Hovstunlinum nakrar metrar.

Í hinari greinini her á síðuni, sæst, at tunnilsfólkið hjá Ístaki halda tað vera meiri enn løgið, at tað knappliga nú, tunnilin er um at vera liðugur, skal stinga seg upp at portalurin skal longjast, tí tað fer at seinka upplatingini einar tríggjar mánaðir.

Hetta kundi langt síðani verið gjørt, leggja tey afturat.

Men stjórin á Landsverki heldur nakað annað.

Fyri tað fyrsta leggur hann dent á, at enn er ongin avgerð tikin um at portalurin skal longjast.

Tað einasta, sum er hent, er, at vit hava spurt okkum fyri, hvat tað fer at kosta at longja portalin og, hvussu langa tíð, tað tekur.

Og fyri tað annað sigur hann, at verður portalurin longdur, er onki løgið í tí.

- Í eini bygging henda tillagingar og broytingar alla tíðina og tað er onki undarligt.

Hann heldur, at hetta er ein slík tillaging.

Oyvindur Brimnes vísir eisini á, at tað er ikki átrokandi neyðugt at longja portalin.

Men hann ásannar eisini, at tað hevði verið best at hann varð longdur fyri at sleppa undan at tað ríður oman á vegin, tí fjallið er nakað bratt omanfyri.

Men nú er langt síðani, at at portalurin var stoyptur. Skal hann longjast, hví er tað so ikki langt síðani gjørt, so at tað ikki seinkar upplatingini?

Men tað dugir Landsverk ikki at svara upp á. Men hann endurtekur, at hann metir at hatta er ein tillaging, sum altíð henda í eini bygging, so hvørt sum tað líður fram á.

- Tað eru nógvar aðrar tillagingar hendar í Hovstunlinum, so tað er onki undarligt í tí.

Annars staðfestir hann eisini, at hetta kemur ikki at seinkað upplatingini nakað.

Fyri tað fyrsta, tekur tað ikki tríggjar mánaðir at longja portalin. Tað er heldur ikki neyðugt at grava asfaltið uppaftur.

Fyri tað annað, hevur Landsverk altíð arbeitt við eini tíðarætlan, sum sigur, at tunnilin skal takast í brúk við árslok og tað fer at halda.

- Helst verður tunnilin liðugur nakað væl fyri tað, so tíðarætlanin heldur.

Annars kann viðmerkjast at á heimasíðuni hjá Landsverk stendur, at tunnilin skal takast í nýtslu í summar.